# Funkur í RVG – leysgeva rokning

Her verður greitt frá

1. hvat leysgevari eigur at **kanna** áðrenn ein rokning verður leysgivin
2. hvussu leysgevari kann **senda eina rokning til annan leysgevara** at avgreiða
3. hvussu leysgevari kann **avvísa eina rokning**, um rokningin er **konterað skeivt**.
4. hvussu leysgevari kann **senda eina rokning aftur at rætta**, um rokningin hevur **skeiva upphædd ella skeivan kreditor**.
5. hvussu leysgevari eigur at senda eina rokning aftur til góðkennara/útbýtara, **um rokning hevur støðuna Góðkenn**.

## 1. Um ein rokning hevur støðuna (Slag) **Leysgev**, ber til at leysgeva hesa. Hugt eigur at verða eftir

- Høvuðsskjalinum
- Møguliga øðrum viðheftum skjølum undir **Skjal 2**. Um onnur skjøl eru viðheft, eigur góðkennari/útbýtari at hava viðmerkt hetta.
- Viðmerkingum undir **Notir 1** og
- Annars um konteringarnar eru rættar. Her ber til at seta flugubein í **Vís lýsing**, so verða heitini á skrásettu kontunum sjónlig.



## 2. Hvussu leysgevari kann **senda eina rokning til annan leysgevara** at avgreiða

Tá ein rokning hevur støðuna **Leysgev** ber til at senda rokningina til annan leysgevara at avgreiða. Trýst á **Flyt**.




Vel annan leysgevara og trýst síðani á **Tilluta**, so verður rokningin flutt til valda brúkaran. Vel **Avlýs** um rokningin ikki skal flytast.



## 3. Hvussu leysgevari kann **avvísa eina rokning**, um rokningin er **konterað skeivt**.

Vel rokningina við skeivari kontering og trýst á **Avvís**. í **Vís rokningargongd** sæst hvør hevur havt rokningina seinast sum **Góðkenn**. Rokningin verður flutt aftur til tann, ið hevur havt rokningina seinast sum **Góðkenn**.



Skriva viðmerking og trýst á **Játta og goym**, fyri at flyta rokningina aftur til góðkennaran, ið sendi rokningina til tín. Vel **Avlýs** um rokningin ikki skal flytast.



## 4. Hvussu leysgevari kann **senda eina rokning aftur at rætta**, um rokningin hevur skeiva upphædd ella skeivan kreditor.

Vel rokningina við skeivari kontering og trýst á **Avvís**. í **Vís rokningargongd** sæst hvør hevur havt rokningina seinast sum **Góðkenn**. Rokningin verður flutt aftur til tann, ið hevur havt rokningina seinast sum **Góðkenn**.



Skriva viðmerking og trýst á **Játta og goym**, so verður rokningin flutt aftur til góðkennaran, ið sendi rokningina til tín. Góðkennarin, má síðani senda rokningina at rætta, sí vegleiðingina **Rætta rokning (t.d. skeiva upphædd)** her. Vel **Avlýs** um rokningin ikki skal flytast.



## 5. Hvussu leysgevari eigur at **senda eina rokning aftur til góðkennara**, um rokningin hevur støðuna **Góðkenn**.

Um rokning hevur støðuna **Góðkenn** ber ikki til at leysgeva. Vel rokningina, trýst á ➕ , skriva viðmerking og trýst síðani á **Flyt**.




Vel góðkennara, ið skal rætta konteringina og trýst á **Tilluta**, fyri at flyta rokningina. Vel **Avlýs** um rokningin ikki skal flytast.

